# TWR –KVINNUR VIÐ VÓN

## BØNARÁHEITANIR FYRI APRÍL 2023

1. Harri, opinbera Teg fyri einsomum fólkum í Svøríki, ið kenna, at lív teirra hevur onga ætlan. Hjálp teimum at sleppa sær undan tómum tráanum, ið økja einsemiskensluna. (Sálmur 36:10; ensk 36:09))
2. Talið av kvinnum, ið eru tilflytarar, er økt stigvíst í Spania síðstu 10 árini. Faðir, varðveit tær frá kynsligum menniskjahandli og betra lívsgóðsku teirra. (5. Mósebók 10:18-19)
3. Gud, lat neiligu ávirkanina frá fjølmiðlum á ungar kvinnur og gentur steðga. Nýt trúartænastuna hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Serbia at læra unga fólkið at finna sín sanna samleika í Tær. (Esekiel 36: 26 -27)
4. Faðir, vit biðja, at toymi okkara í Rumenia fær íblástur, sum tær evna *Kvinnur við Vón* sendiskráir, har innihaldið hevur týdning, og at gestatalararnir hjálpa lurtarunum at kenna og elska Teg meir. (Sálmur 40:10)
5. Kæri Gud og Faðir, vilt Tú bøta um álvarsomu fíggjarstøðuna í Portugal, so fólk kunnu gerast før fyri at keypa mat fyri sámuligan prís. (Matteus ev. 6:25)
6. Í Grønlandi vaksa 37% av børnunum upp uttan ein faðir. Styrk einligar mammur, ið royna at finna javnvág millum barnauppaling, arbeiði og lesnað. Útvega hesum børnum andaligar menn, sum kunnu vegleiða tey. (Sálmur 68:6, ensk 68:5)
7. Harri, gev leiðarum í Pólandi vísdóm at bøta um heilsutænastuna til kvinnur, og at geva læknunum hægri løn, so teir ikki noyðast at flyta av landinum at finna størv, ið eru betri lønt. (Jákupsbræv 1:5)
8. Gud, vit biðja, at TWR *Kvinnur við Vón* í Noregi kunnu fáa fleiri inntøkur, so tær kunnu boða Evangeliið fyri enn fleiri  ónáddum fólkasløgum. (Markus 16:15)
9. Harri, so nógvar albanskar kvinnur líða av tunglyndi. Grøð sinni og likam teirra, tá tær rópa til Tín um hjálp. Leið tær til onnur, ið kunnu hjálpa. (5. Mósebók 31:8)
10. Góði Gud, lat fleiri  í Norður Kaukasus tekna seg sum haldarar av *Kvinnur við Vón* sendiskráum, ið finnast á fleiri pallum, orsakað av avmarkingum at nýta sosialar miðlar. (Seinna Korintbræv 4:16)
11. Almáttugi Faðir, leið tær kvinnur, ið liva av skøkjulevnaði í Týsklandi, til *Hidden Treasure (Fjaldur Skattur)* útvarpssendingarnar, so tær kunnu finna tryggleika og nýtt lív í Jesusi. (Esaias 45:3)
12. Góði Gud, styrk og eggja kvinnur í Finnlandi, ið kenna seg sperdar og mótleysar í síni yrkisleið og av ábyrgdini í familjuni. (Matteus 11:28)
13. Harri, slít leinkjurnar hjá foreldrum í Grønlandi og Føroyum, ið eru bundin av rúsdrekka. Ger at tey ala børn síni upp í gudsótta. (Orðtøkini 22:6)
14. Gud, lat kvinnurnar ið luttaka á TWR *Kvinnur við Vón* stevnuni í Noregi 14. – 16. apríl, verða styrktar og gerast meira virknar í verki Tínum. (Fyrra Tessalonikubræv 5:11)
15. Faðir, vit biðja fyri danska fólkinum, at tey skilja, hvussu dýrabart lívið er, og at børn eru gáva Guds. (Sálmur 139: 13-16)
16. Vit prísa Tær, Gud, at talið av fylgjarum og teimum, ið eru virkin á facebooksíðuni hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Kroatia, økist. (Sálmur 71:8)
17. Harri, vilt Tú hjálpa kvinnum í Albania, ið flyta úr skýlum fyri harðskapsraktar kvinnur, at fáa arbeiði og bústað, so tær ikki venda sær til skøkjulevnað, tí tær ongan pening hava at kunna taka sær av børnunum. (Matteus 6:11)
18. Faðir, drag ung fólk í Svøríki, ið luttaka í kriminaliteti, at trúgva á Teg og fylgja Tær. Lat tey gevast við at oyðileggja sítt egna lív og lívið hjá øðrum. (Markus 1:17)

19. Gud, hjálp kristnum ommum í Spania, ið taka sær av ommubørnum, tí kreppa ella hjúnaskilnaður er í familjuni. Lat tær hava eina gudrøkna, bíbilska ávirkan á ommubørnini. (5. Mósebók 6:6-7)
20. Faðir, vegleið tey, ið arbeiða við at týða og útgeva nýggju *Precious and beloved (Dýrabør og elskað)* sendingina. Lat kvinnur í Serbia og Kroatia gjøgnum hesa sendingina kenna kærleika Tín og finna sína tign og sítt virði í Tær. (Fyrra Pætursbræv 3:4)
21. Faðir, styrk trúgvandi kvinnur í Rumenia at verða trúføst vitni fyri Teg í hesi torføru tíð. (Matteus 5:13-16)
22. Harri, gev TWR *Kvinnur við Vón* toyminum í Portugal náði, vísdóm og skapandi evni, nú tær eru í ferð við at gera handrit til nýggjar trúartænastusendingar. (Orðtøkini 2:6)
23. Gud, vit biðja, at Tú vilt varðveita sosialu støðuna, vælferðina og rættartrygdina hjá kvinnum í Pólandi. Ver verji og forsyrgjari teirra. (Sálmur 5:12; ensk 5:11)
24. Faðir, vit biðja, at Tú gevur kvinnum, ið lurta eftir TWR *Kvinnur við Vón* sendingum í Norður Kaukasus og hava torfør hjúnaløg, vísdóm. Lat tær finna vón í kærleika Tínum. (Jákupsbræv 1.11)
25. Harri, vit takka Tær, at bønarstevnan 2022 hjá TWR *Kvinnur við Vón* í Týsklandi eydnaðist væl. Takk fyri tey, ið stuðla trúartænastuni peningaliga og við bøn. (Malakias 3:10)
26. Faðir, vegleið tey, ið stríðast við tunglyndi og einsemi í Finnlandi, at tey hugsa um sannleikar Tínar og kunnu sanna, at tey eru ikki einsamøll. Hjálp teimum at koma í samband við fólk og felagsskapir, ið kunnu hjálpa teimum. (5. Mósebók 31:8)
27. Gud, lat kristna arbeiðið millum lesandi í Grønlandi hava framgongd. Lat hesi ungu hava ein kristnan felagsskap, har tey kunnu lesa Bíbliuna og verða stimbrað. (Fyrra Tessalonikubræv 5:11)
28. Harri, vit biðja teg um at eggja og geva fámenta TWR *Kvinnur við Vón* toyminum í Danmark íblástur í trúartænastu teirra. (Filippibr. 4:13)
29. Himmalski Faðir, vit biðja, at einligar kvinnur í Kroatia kunnu fáa barnapening regluliga frá fyrrverandi monnum sínum. (Matteus 7:9)
30. Harri, styrk samkomuna í Albania at vera ljós í hesum myrka heimi. Lat tær hjálpa kvinnum at liva eitt gudrøkið og ríkt lív. (Efesusbrævið 5:8)

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn” (Eeva Vähäsarja)**

**Kvinnur við Vón - Sameinandi hjørtu okkara í bøn - Apríl 2023**

**Læra, eggja og venja kvinnur at biðja, lurta, læra, vaksa og geva**

# Endurskapa vón til tey lítilsverdu

eftir Biljana Dolic, TWR kvinnur við Vón í Serbia

Serbia er eitt avbera vakurt land at síggja til, men tað hevur eina rokmikla søgu, ið sigur frá kríggjum í nýggjari tíð, tjóðskaparligum og átrúnaðarligum ótolsemi og truplum støðum hjá fólkinum har. Ein partur, ið hevur verið mest ávirkaður av hesum, eru kvinnurnar í Serbia.

Av tí at kvinnur ikki hava sama rætt sum menn, og mangan ikki hava atgongd til lærdóm, kenna fleiri av teimum seg lítilsgjørdar og ósæddar. Ágangur móti kvinnum, misrøkt og misnýtsla av teimum er vanligt her. Tað er tí, at TWR *Kvinnur við vón* trúartænastan kemur

til hetta ótrygga land eins og heilivágur, ið grøðir sundurbrotin hjørtu og særdar kenslur, endurskapar vón og ber samljóð til familjubond.

Hvønn dag nær ein stuttur boðskapur, ein bøn ella eitt skriftstað til nærum 10.000 kvinnur í Serbia og 7.000 kvinnur í Kroatia gjøgnum Facebook- og Instagramsíður okkara og á You Tube rásini. Kvinnur hava møguleika at hoyra, hvussu virðismiklar og elskaðar tær eru av Honum, ið skapti tær, og sum hevur eina undurfulla ætlan fyri lív teirra. Tað er so stórbart at síggja umbroytingina, ið kvinnur uppliva, tá ið tær møta Jesusi, og undurfulli kærleiki Hansara endurskapar samleika og virði teirra og gevur teimum vón.

Okkara toymi her í Serbia arbeiðir sera tætt saman við *Kvinnur við Vón* toyminum í grannalandinum Kroatia. Tey gera *Kvinnur við Vón* sendingar á kroatiskum máli, og vit gera tað sama á serbiskum máli. Hesar sendingar eru eindømi í hesum øki. Higartil hevur tað ikki verið nøkur sending, sum er ætlað serstakliga kvinnum, og sum hevur givið teimum praktiskar vegleiðingar í gerandisdegnum, og eisini víst teimum bíbilska sjónarmiðið yvir ymiskar trupulleikar og umstøður.

Gud hevur eisini latið upp dyr fyri okkum at kunna fara undir at týða og gera sendingar til eina nýggja røð fyri kvinnur, ið kallast *Virðismikil og elskað (Precous and Beloved)* Sum toymi okkara er í ferð við at menna og víðka trúartænastuna í Kroatia, gleðast vit um ynski hjá toyminum har um eisini at fara undir at senda *Virðismikil og elskað* í teirra landi komandi ár.

Bøn er eisini ein annar týdningarmikil partur í trúartænastu okkara í Serbia. Hvønn mánað týða og prenta vit út TWR *Kvinnur við Vón* bønarkalendaran. Stórt tal av kvinnum í Serbia koma regluliga saman at biðja fyri kvinnum um allan heim, har tær nýta bønarkalendaran.

Vit tæna eisini serbiskum kvinnum á mangan annan hátt. Vit hjálpa teimum neyðstøddu, við at veita teimum mat og klæðir og annað, sum teimum tørvar til lívsins uppihald. Ynski okkara er at bjóða øllum Bíbliur uttan kostnað, og vit hava gjørt tað møguligt hjá fleiri túsund kvinnum at fáa sína fyrstu Bíbliu. Vit virka eisini millum Romakvinnur. Innihaldið í *Kvinnur við Vón* sendingum okkara ber hesum gentum og kvinnum vón og grøðing uttan mun til aldur.

# SØGA UM VÓN

## Lívgan og vón fyri tey tystandi

### Søga eftir TWR *Kvinnur við vón* økissamskiparan í Norður Kaukasus

TWR *Kvinnur við vón* trúartænastan í Norður Kaukasus ber fólkinum í hesum økinum í útsynningspartinum av Russlandi frið og troyst. Og hetta er ikki bara orð.

Í 1999 førdi ein spent støða í Norður Kaukasus til kríggj, og fólk doyðu. Trúboðarar rýmdu úr muslimskum tjóðum, og kirkjur og samkomur vórðu útruddaðar. Fólkið í Kaukasus minnast ta torføru tíðina, tí sárini eru ikki enn lekt. Fólk hava upplivað hungur, at missa síni kæru og gerast heimleys. Nú uppliva tey ein øðrvísi, men kortini líkan ótta: Tað er eingin friður, bert stúran og møði. Kvinnurnar vilja fegnar hoyra og síggja tekin um góðsku og ljós. Tað er tosti eftir vón og lívgan. Tí er hetta tann rætta tíðin at virka í hjá trúartænastuni TWR *Kvinnur við vón*! Hvønn mánað vitja vit tríggjar familjur, sum hoyra til tann ráðandi átrúnaðin í økinum.

Vitnisburðurin hjá Alinu* og syni hennara Marat* er rørandi á ein heilt serligan hátt. Alina er einkja. Av tí at hon hevur mist mannin og lítlu dóttur sína, er 10 ára gamli sonurin Marat hennara einasta vón, sum hon hevur eftir. Tey hava eingi skyldfólk, sum kunnu hjálpa teimum í truplu støðuni. ”Men vaksið í náði og kunnsakpi Harra og Frelsara okkara Jesu Krists!” (Seinna Pætursbræv 3:18A) Fyri fáum árum síðan fekk Alina staðfest, at hon hevði krabbamein, og árið eftir fekk sonurin eisini staðfest krabbamein. Alina bað tann almáttuga Gud, at hann ikki skuldi lata hana doyggja, meðan Marat enn var á lívi, tí so fór eingin at vera til at taka sær av honum. Sum tíðin leið fór heilsa hennara at bila, tí hennara avlamis pensjón rakk bert til at keypa heilivág til Marat. Júst í teirri løtuni, tá Alina var einsamøll og tørvaði hjálp, leiddi Gud okkum til at koma í samband við hana. Nú líður Alina av Hepatitis C (livrabruna). Hóast sjúkan hevur breitt seg, hevur hon enn bert ráð til at keypa heilivág til Marat. Hon ofrar seg fyri ein kæran, tað minnir nógv um, hvussu Kristus ofraði seg fyri hvønn einstakan av okkum. *Kvinnur við vón* toymið í Norður Kaukasus fer á sjúkrahúsið við Alinu, og tey gera tað, sum tey kunnu gera til at rinda rokningarnar fyri hennara grundleggjandi heilivág. Tað hevur verið sárt at síggja hana vikna og missa heilsuna, og vit biðja saman við Alinu, at Harrin Jesus kundi útvegað henni alt tað, sum tørvar henni fyri at hon kann koma fyri seg til fulnar. Tað mesta, sum eg havi havt at stúra fyri seinastu tíðina, fánar, tá eg hugsi um støðuna hjá Alinu og Marat. Tá onkur úr okkara toymi vitjar Alinu og roynir at stuðla henni, biðja vit saman og tosa um Jesus. Vit eru greið yvir, at okkara trúgv má ikki vera bert í orðum; vit mugu virka í trúgv! Biðið inniliga saman við okkum fyri Alinu og Marat í hesum døgum.

*Dulnevni av trygdarávum

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

## Fíggjarstuðul:

**EvR hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR. –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**

**GLEÐILIGAR PÁSKIR**